# Guðrun fær ikki stundir at feiðra studentsprógvið

**Hon fekk húgvuna á høvdið á miðdegi týsdagin, men longu í gjáramorgunin fór hon aftur til Danmarkar har nógv er á skránni**



*Guðrun Jacobsen er longu farin av aftur landinum, men sunnudagin kemur hon aftur at syngja á konsert á jóansøku á Tvøroyri*

STUDENTSPRÓGV
*Áki Bertholdsen*

Meðan allir studentar í hesum døgum mest hugsa um pisufund og, hvussu nývunnað prógvið annars skal feirast, er tað ein studentur, sum bara hevur arbeiðið at hugsa um.

Guðrun Sólja Jacobsen fekk húgvuna á høvdið týsdagin á miðdegi, men stundirnar at hátíðarhalda hendan stóra dagin hava ikki verið nógvar.

Seinnapartin skrivaði hon autografar í CN Wear á Tvøroyri, har ein javnur streymur av fólki, bæði yngri sum eldri stukku inn á gólvið at fáa hendur á eini mynd við eini heilsan á.

Um kvøldið hevði hon floksfelagarnar á vitjan heima við hús og um kvøldið fóru tey at hyggja eftir bálinum, sum var inni við skúlan í Trongisvági.

Men longu í gjáramorgunin fór hon aftur landinum, tí fleiri konsertir eru á skránni í Danmark hesar komandu dagarnar.

Sunnukvøldið kemur hon aftur til Føroyar, her hon skal syngja á gospelkonsert saman við United Voices á konsert á jóansøku á Tvøroyri, men longu mánadagin fer hon aftur á flog.

Umframt nógvar konsertir ymsastaðni, er hon eisini hvønn dag í upptøkuhølunum.

– Eg havi enn nóg mikið at gera. Konsertir eru hvørt vikuskiftið og mitt í viku eri eg í uttøkuhølunum í sambandi við fløguna.

Og Guðrun vil framvegis ikki siga, at hon býr niðri, hóast tað ikki skerst burtur, at tað er sjálvdan, at hon er heima.

Hon sigur, at hon framvegis stórtrívist í hesum nýggja leiklutinum sangari og at hon ongantíð hevur hildið, at tað hevur verið strævið.

Og at hon skuldi fáa studentsprógv, var bara prikkurin yvir i'ið, tí tað hevði hon als ikki vænta. Tá ið hon hevði vunnið Stjerne for en aften, var hon til reiðar at sleppa skúlanum, men helt so kortini fram og hevur nú fingið prógvið við einum heilt heiðurligum miðaltali, sum hon sigur.

### Fingið á alnetinum

At Guðrun ger alsamt meiri og meiri um seg, sæst eisini av, at hon nú eisini er at finna á alnetinum, har hon seinastu dagarnar hevur fingið ikki færri enn tvær heimasíður.

Almenn heimasíðan hjá henni er á http://www.gudrun-jacobsen.com

Tað er ein heimasíða, sum er gjørd í samstarvi við Unviversal Music, sum er plátufelag hennara og onnur.

Men hon hevur eisini eina fjepparaheimasíðu og hon er á http://www.gudrunsolja.dk

Á báðum heimasíðunum eru myndir, tíðindi og aðrir upplýsingar.



*Týsdagin skrivaði nýklakta pisan, Guðrun Jacobsen, autografar í CN Wear á Tvøroyri, har ein javnur streymur av fólki var og fekk eina heilsan frá henni*

# Umhvørvisfólk mæla fólki frá at keypa fisk

**– Vit merkja at umhvørvisverndarfól k nú eru farin í hernað ímóti fiskiskapi, sigur Olaf Olsen, stjóri á einum av teimum stóru feløgunum í fiskivinnuni**

UMHVØRVISVERND
*Áki Bertholdsen*



*– Higartil hevur tað verið grindadráp. Nú er tað fiskur: Úti í verðini gongur rákið tann vegin, at fólk vilja ikki eta fisk, tí hann skal vera í ferð við at doyggja út, sigur Olaf Olsen og tað kann vera ein orsøk til, at tað er so trupult at sleppa av við fisk í løtuni*

Broddurin er ikki meiri enn tikin av herferðini ímóti grindadrápi, so er tað nógv, sum bendi á, at føroyingar hava fingið eitt nýtt stríð at hugsa um.

Og hetta er kanska ikki minni álvarsligt enn ágangurin ímóti grindadrápi.

Nú eru umhvørvisverndarfólk nevniliga farin í hernað ímóti fiskiskapi og eru farin at mæla fólki frá at eta fisk.

Og vindur hetta upp á seg, er tað eyðsæð, at tað kann gerast ein sonn vanlukka fyri føroyska búskapin.

Í øllum førum førum er hendan herferðin so smátt farin at merkjast í Føroyum.

Ein av teimum stóru reiðaravirkjunum í landinum er Beta og stjórin har, Olaf Olsen sigur, at hann heldur, at tey merkja tað væl, at ein herferð er farin ígongd í ímóti at eta fisk.

Herfyri fingu øll skúlabørn í Noregi eina tráðu í part frá nøkrum felagsskapum, men tað hóvaði ikki norsku djóraverndini.

– Eg sá á Portalinum nú ein dagin, djóraverndin í Noregi mótmælti hesum og mælti frá, at børn fiska við tráðu, tí tað er djórapínsla.

– Eg las eisini í einum blaði nú ein dagin, at sjálvur svenski kongurin kunngjørdi, at hann át ikki fisk úr Eystrasalti, tí har var so skitið.

– Og hóast kongur ikki hevur so stórt vald longur, sum hann hevði fyrr, kann tað vera, at onkur lurtar, tá ið tað er sjálvur kongur, sum talar og hann ivast ikki í, at alt hetta hevur sína ávirkan.

Tað er eisini ein sannroynd, at ymisk heimskend fólk hava talað ímóti at fiska fisk.

### Útbreitt ímillum vanlig fólk

Olaf Olsen sigur, at hann so seint sum týsdagin fekk ein teldupost frá einum tilvildarligum fólki, sum sigur, at tað stúrir almikið fyri at fiskastovnarnir minka so nógv. Ì teldupostinum verður eisini heitt á felagið hjá Olaf Olsen um at halda uppat at fiska.

– Tað er heldur ikki óvanligt at hitta fólk uttanlands, sum spyrja meg, hvussu er vorðið við fiskinum og um hann ikki er í ferð við at doyggja út. Og av tí sama vilja tey ikki eta fisk.

Olaf Olsen heldur, at júst tað, at talan er um púra vanlig fólk, sigur honum so mikið sum tað, at hetta er ikki bara nakað, sum melur í høvdinum á nøkrum fáum, fanatiskum umhvørvisverndarfólkum, men at hetta er nakað, sum eisini fólkið á gøtuni hugsar um og sum er útbreitt ímillum vanlig fólk.

Men hann veit ikki um hetta eisini er sprottið ímillum vanlig fólk ella um tað eru umhvørvisverndarfeløg, sum standa aftanfyri.

– Eg veit heldur ikki, hvussu nógv tað ávirkar í løtuni, men hetta er eitt rák, sum er farið at gera um seg. Og hann heldur avgjørt, at hetta er eitt mál, sum føroyingar eiga at hava í huganum.

– Vit hava í nógv ár verið rakt av eini herferð ímóti at drepa grind. Vit gjørdu sum rætt var og stríddust ímóti teirri herferðini. Og tað hevur hjálpt, tí ágangurin er ikki so stórur longur.

– Men nú tykist tað sum, at hendan herferðin er flutt yvir á vanligan fisk.

Annars hevur fiskaprísurin verið sera høgur í fleiri ár, men Olaf Olsen heldur, at tað kann hava havt sínar serligu orsøkir.

– Eg haldi, at tað, sum hevur hjálpt okkum í nøkur ár, er at fólk hava ikki torað at etið neytakjøt, tí tey hava verið bangin fyri neytaøði. Og so skerst heldur ikki burtur, at nógv er gjørt fyri at fortelja fólki, hvussu sunt tað er at eta fisk.

– Men nú bendir nógv á, at fólk eru farin at taka heilsuna á fiski framum sína egnu heilsu.

Ì hvussu so er heldur Olaf Olsen, at okkurt er galið, tí hóast fiskaprísirnir eru falnir heilt munandi seinastu tíðina, hava tey, sum skulu keypa fisk, onki merkt til tað.

– Tey, sum skulu eta fiskin, betala akkurát líka nógv fyri hann í handlunum nú, sum tey hava gjørt. So hann er ikki blivin bíligari. Kanska er fiskurin enntá blivin dýrari. Tað merkir sostatt, at orsøkin til prísfallið er ikki bara tað, at fólk ikki vilja betala: Orsøkin er heldur hinvegin, at tey vilja ikki keypa.

Og tá ið eftirspurningurin er minkaður, fellur prísurin sjálvsagt hjá okkum, sum selja fisk, sigur Olaf Olsen.



# Nýggjar upplýsingar um hópneyðtøku

**Ein serlækni stuðlaði mánadagin upp undir frágreiðingina hjá føroysku kvinnuni, sum sigur seg vera hópneyðtikna eftir ein jólafrokost í Keypmannahavn. Eystari landsrættur er liðugur at viðgera málið, og dómur fellur helst seinnapartin mánadagin í næstu viku**

HÓPNEYÐTØKA
*Ingi Rasmussen*



*Í hesum garðinum í Silkeborggade á Frederiksberg sigur ein føroysk kvinna seg vera neyðtikna av minst fimm donskum monnum.*

*Mynd: Polfoto*

Tað vakti stóran ans, tá fimm mans vóru fríkendir í býrættinum fyri at hava neyðtikið eina 25 ára gamla føroyska kvinnu eftir ein jólafrokosti í Frederiksberg tann 8. desember 2001. Dómararnir vóru kortini ikki samdir í frídømingini, og millum annað av hesi orsøk gjørdi statsadvokaturin av at royna málið við Eystara landsrætt.

Eystari landsrættur er nú liðugur at viðgera sonevnda jólafrokost-málið, sum danskir fjølmiðlar hava doypt tað.

– Landsrætturin hevur viðgjørt málið í tveir dagar í síðstu viku og tveir dagar í hesi vikuni, og seinnapartin mánadagin fellur dómurin helst, sigur Hanne Petersen, deildarleiðari í Eystara landsrætti, við Sosialin.

Mánadagin í næstu viku vera nøkur skjalprógv løgd fram, og síðan verður málevnisumrøðan, har ákæri og verji fáa høvi at siga síni síðstu orð í eini roynd at ávirka teir tríggjar landsrættardómararnar. Beint aftaná fara dómarararnir í einarúm at umráða seg, áðrenn dómurin fellur.

### Merki eftir neyðtøku

Vitni, teir ákærdu og kvinnan eru avhoyrd einaferð afturat í landsrættinum, men harafturat er okkurt nýtt komið fram. Eitt nú hevur ein serlækni frá »Center for voldtægtsofre« ført fram, at tær skeinurnar, sum føroyska kvinnan hevði í undirlívinum, eru klassiskir skaðar eftir eina neyðtøku.

Kvinnulæknin Lisa Bang kannaði kvinnuna fáar tímar eftir, at hon hevði meldað neyðtøkuna og hevur skrivað í sínari frágreiðing til løgregluna, at kvinnan hevði nakrar skeinur, sum hon gjøgnum síni mongu ár sum gynækolog bara sá hjá neyðtøkuofrum.

– Eg havi ongantíð sæð slíkar skeinur hjá kvinnum, sum sjálvbodnar hava havt samlegu. Eisini sjálvt um kvinnurnar hava havt kært seg um trupulleikar. Í slíkum førum hava snuddirnir vera av øðrum slagi, segði Lisa Bang, tá hon varð avhoyrd í landsrættinum.

Teir fimm verjarnir royndu at sáa iva um útsøgnina hjá serlæknanum. Teir spurdu áhaldandi, um slíkir skaðar ikki kunnu koma fyri, hóast talan ikki er um neyðtøku. Serlæknin segði, at tað kundi hon ikki útiloka, men hon hevði ongantíð sjálv sæð tað.

### Eitt nýtt mál

Útsøgnin hjá serlæknanum kom ikki fram í býrættinum, tá teir fimm menninir vóru fríkendir, og tí kann roknast við, at hon fær týdning.

Teir fimm menninir hava nevniliga viðgingið at verið saman við føroysku kvinnuni, men hava ført fram, at hon sjálvboðin gekk við til hópsamleguna, sum fór fram í einum bakgarði í Frederiksberg. Kvinnan meldaði hinvegin sjálv tilburðin til løgregluna beinanvegin.

Haraftrat kann tað eisini fáa týdning fyri málið, at síðan menninir vóru fríkendir, er ein teirra dømdur fyri hópneyðtøku móti einari heilt ungari gentu aðrastaðni í Danmark. Ta ferðini vildi maðurin eisini vera við, at gentan sjálvboðin var við í leikinum.

Samanumtikið er so mikið nógv nýtt komið fram í málinum, at tepri dómurin, sum varð sagdur í býrættinum, av álvara skinklar. Málið hevur vakt stóran ans, bæði í Føroyum og Danmark, og eitt nú kvinnuhúsið hevur ført fram, at rættarskipanin ger sær størri ómak at verja tann ákærda enn ofrið.

Hvussu verður og ikki. Dómur fellur mánadagin, og hann verður endaligur.

**Málið**

Ein 25 ára gomul føroysk kvinna er tann 8. desember 2001 ávegis heim í Keypmannahavn eftir ein jólafrokost. Á vegnum verður hon boðin innar til ein annan jólafrokost, har ein handverkarafyritøka heldur til. Seinni sigur hon seg vera hálaða útum og neyðtikin av minst fimm monnum. Teir fimm menninir vera seinni fríkendir í býrættinum, tí tveir av teimum trimum dómaranum trúgva frágreiðinini hjá monnunum, sum siga, at hon var við upp á tað. Tann triði dómarin trúði gentuni. Statsadvokaturin kærir málið til landsrættin, sum fellur dóm mánadagin.

# Fyrstu stjórnmálafrøðingarnir á Setrinum

**Fríggjadagin fáa tey fyrstu, sum hava lisið stjórnmálafrøði á Fróðskaparsetrinum, handað prógv. Tey kunnu nevna seg »baccalaureus socialis scientarium« ella B.S.Sc. í stjórnmálafrøði**

ÚTBÚGVING
*Ingi Rasmussen*

Nú kann Fróðskaparsetrið skjótt erpa sær av at hava útbúgvið sínar fyrstu stjórnmálafrøðingar.

Útbúgvingin byrjaði á fyrsta sinni í Føroyum í 2000, og tey átta, sum fríggjadagin fáa prógv í stjórnmálafrøði, eru tey fyrstu í søguni hjá Setrinum. Tilsamans byrjaðu eini 25 at lesa fyri tveimum trimum árum síðan.

Fyri at tú kanst rópa teg stjórnmálafrøðing skalt tú hava lisið í minst trý ár og hava havt minst trý fak. Tey eru føroyskur politikkur, altjóða politikkur og løgfrøði. Tey skulu eisini skriva eina høvuðsuppgávu, og hon var latin inn 11. juni.

Útbúgvingin er gjørd í samstarvi við Aalborg Universitet og RUC. Sostatt kunnu tey lesandi halda fram við lesnaðinum í Danmark, og útbúgvingin er fult á hædd við tær donsku. Prógvini verða handað fríggjamorgunin klokkan 10. Fyrst bjóðar Jóan Pauli Joensen, deildarleiðari, vælkomin. Síðan greiður Jógvan Mørkøre, adjunktur í stjórnmálafrøði, frá útbúgvingini. So kemur stóra løtan, tá Malan Marnersdóttir handar prógvini. At enda fær umboð fyri bakkalaurusarnar høvi at siga nøkur orð.